# Annika ikki læst seg fasta í endaligan leist

**KOMMUNUREFORMUR** Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, sigur, at uttan mun til hvat endaliga úrslitið av kommunureforminum veðrur, so fara kommunurnar at klára seg

Leo Poulsen

Borgarstjórarnir í kommununum undir Føroya Kommunufelag vóru í morgun møttir á fundi, sum felagið hevði skipað fyri við landsstýriskvinnuni í kommunumálum, Anniku Olsen.

Landsstýriskvinnan var biðin um at koma á fundi at greiða gjøllari frá upplegginum hjá landsstýrinum av einum kommunureformi, sum hevur verið á veg í longri tíð.

Asbjørn Djurhuus, sum er formaður fyri Føroya Kommunufelag, var væl nøgdur við fundin.

– Hon greiddi nærri frá ætlanunum, sum hon hevur um ein kommunureform, men um eg lærdi so nógv nýtt, veit eg ikki. Tað er í hvussu er vert at leggja til merkis, at hon hevði ikki læst seg fasta í nakran endaligan leist, og fegin lurtaði eftir ráðum, sigur Asbjørn Djurhuus.



*Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, var væl nøgdur við fundin við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í kommunumálum*

Álvur Haraldsen

Hann sigur, at landsstýriskvinnan vísti á andan í upplegginum og at tað skuldi verða so fólksligt um gjørligt.

– Hvat tað so meinast við. Eg veit ikki, um tað er sum tá Ábraham og Lot býttu sundur á sinni: Fer tú til høgru, fari eg til vinstru, sigur Asbjørn Djurhuus skemtandi.

Eisini ein fólkaatkvøða varð nevnd.

– Men tað er av sera stórum týdningi, at hevur tú eina fólkaatkvøðu, so má tað vera púra greitt, hvat tað er tú atkvøður fyri. Alt má liggja við, sum ætlanin er at leggja út á kommunurnar, og í hesari forsamlingini verður mett, at best er um landið sjálvt stendur fyri fólkaatkvøðuni, sigur Asbjørn Djurhuus.

## Eingin semja

Limirnir í Føroya Kommunufelag spenna ógvuliga vítt.

– Vit hava kommunur í felagnum sum hava heilt niður undir 50 íbúgvar, upp til kommunur við 3.000 íbúgvum, so líka so vítt íbúgvaratalið spennir líka ymiskar eru meiningarnar um kommunusamanlegging, sigur Asbjørn Djurhuus.

Hann sigur, at kommunurnar hava fingið sær fyrisiting út frá teirri fyritreyt, at økir skuldu leggjast út á kommunurnar.

– Skúlin skuldi jú leggjast út á kommunurnar fyri tveimum árum síðani, uttan at nakað er hent. Nú verður tosað um 2013, men eftir øllum at døma er ikki semja um tað heldur, sigur Asbjørn Djurhuus.

Eisini á øðrum økjum draga áhugamálini í hvør sína ætt.

– Summar kommunur eru meira skuldartyngdar enn aðrar, og summar kommunur eru ikki komnar so langt í útbyggingini sum aðrar, til dømis tá um kloakkskipanina viðvíkur, sigur Asbjørn Djurhuus.

Hann sigur, at summar kommunur eru í bíðistøðu, meðan aðrar halda, at tað er bara at binda um posan og leggja kommunurnar saman við lóg.

– Eg havi altíð verið av teirri áskoðan, at kommunurnar hava altíð megnað tað, ið er lagt á tær, og tað rokni eg við, at tær fara at gera hesaferð eisini, sigur Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag.



# Neyðugt at kommunurnar eru við

**KOMMUNUREFORMUR** Annika Olsen, landsstýriskvinna við kommunumálum, er væl nøgdi við fundin við Føroya Kommunufelag. Hon sigur, at kommunurnar í dag eru í iva, men tað er av stórum týdningi, at tær ikki eru tað, tá niðurstøðurnar verða gjørdar

Leo Poulsen

– Tað var ein fínur fundur, haldi eg. Sjálvandi høvdu kommunustýrislimirnir nógvar spurningar, og eg haldi, at tey fingu eitt nøkurlunda nøktandi svar upp á teir spurningarnar, sigur Annika Olsen.

Landsstýriskvinnan sigur, at fyri hana er tað mest týdningarmikla, at limirnir í Føroya Kommunufelag fáa høvi at siga sína hugsan nú.

– Tað er av týdningi, tí so fáa tey eisini møguleikan at ávirka málið, og fáa ført fram síni ynskir, og eg vóni veruliga, at hetta fer at røkka á mál, sigur Annika Olsen.

Tað er ein fylgibólkur, sum hevur arbeitt við sjálvari tilgongdni til kommunusamanleggingina, og tað var hetta, ið var evnið á fundinum.

– Tað var ikki so nógv eldraøkið og skúlaøkið, sum var frammi, og tí vóru heldur ikki landsstýriskvinnurnar í almannamálum og mentamálum við á fundinum. Men sjálvandi vóru borgarstjórarnir áhugaðir í at fáa meira at vita um innihaldið í ætlanunum um at leggja eldraøkið út á kommunurnar 1. januar 2013, sigur Annika Olsen.

Landsstýriskvinnan sigur, at hetta við eldraøkinum fara tey at venda aftur til.

– Hetta fyrsta stigið í samskiftinum við kommunufeløgini er um, hvussu vit fáa skipa kommunurnar í størri eindir og ta fólksligu tilgongdina til samanleggingarnar, sigur Annika Olsen.

## Eingin ivi vera

Tað er eingin loyna, at tað finnast kommunur, sum hvørki so ella so vilja leggja saman, men tað kemur ikki óvart á landsstýriskvinnuna.

– Eg hugsi, at tað er líka stór ósemja millum kommunustýrislimir sum tað er millum tingfólk, tá tað snýr seg um at leggja kommunur saman sjálvboðið ella við lóg, sigur Annika Olsen.

Hon vónar kortini, at tað fer at bera til at finna semju, so tey í felag kunnu lyfta hesa uppgávuna.

– Tí tað, sum eisini er umráðandi í hesum málinum er, at kommunustýrini eisini síggja ein fyrimun í hesum og vilja arbeiða fram í móti teimum loysnum, sum vit í Løgtinginum samtykkja. Tí er tað av týdningi, at vit finna fram til eina semju á kommunala økinum, sigur Annika Olsen.

Hon væntar tó, at tað verður trupult.

– Tað eru so ótrúliga nógvar meiningar um, hvussu hetta skal skipast, sigur Annika Olsen.

Hon sigur, at tað var trupult at lodda dýpið eftir at fundurin var lokin.

– Tað er ilt at siga. Sjálvandi eru borgarstjórarnir í iva, men tað skulu teir helst ikki vera, tá vit koma fram til eina niðurstøðu. Tá broytingar skulu henda á kommunala økinum er tað av stórum týdningi, at kommunustýrislimir vita heilt nágreiniliga, hvat endamálið er við tí, sum verður sett í verk, sigur Annika Olsen.

Hon heldur lítið endamál vera við at leggja kommunur saman við lóg uttan at annað hendir.

– Soleiðis, sum kommunurnar eisini hava ført fram á fundinum, er tað umráðandi, at tær fáa økir at fyrisita, har kommunurnar veruliga fáa innihald, og tað er av stórum týdningi, eisini at taka hædd fyri tí, sigur Annika Olsen.